Skrivstovufólk

Til Náttúruvísindadeildina á Fróðskaparsetri Føroya verður søkt eftir skrivstovufólki. Starvið er fyribils avmarkað til tíðarskeiðið frá 15. juli 1988 til 31. august 1989.

Arbeiðið fevnir um vanligt skrivstovuarbeiði, serliga við tilknýti til fyrisitingina á Náttúruvísindadeildini. Sarvið er fjølbroytt, og dentur verður lagdur á førleika at arbeiða sjálvstøðugt og at gott samstarv er millum skrivstovu og undirvising.

Umsøkjarar við góðum kunnleika í føroyskum og maskinskriving/tekstviðgerð hava fyrimun.

Løn og arbeiðstreytir sambært sáttmálanum millum Starvsmannafelagið og Føroya landsstýri.

Maskinskrivað umsókn við avriti av prógvi v.m. verður at senda Náttúruvísindadeildini, Fróðskaparsetri Føroya, FR-100 Tórshavn, **í seinasta lagi 1. juli 1988.**

Náttúruvísindadeildin
Fróðskaparsetur Føroya
J. C. Svabosgøta 7
FR-100 Tórshavn
Tlf. 15306

sosialurin

Lærarastørv við Klaksvíkar Sjómansskúla

2 størv sum lærari við Klaksvíkar Sjómansskúla verða hervið lýst leys at søkja við gildi frá 1. august 1988.

Størvini eru tænastumannastørv í lønarflokki 25-27-29 við teimum skyldum, sum ásettar eru í sáttmála millum Føroya Landsstýri og Tænastumannafelagið.

Umsøkjarar skulu hava útbúgving á hægsta nautiska stigi og hava skyldu til at fara undir eftirútbúgving, um hetta verður kravt.

Umsóknir skulu verða Landsskúlafyrisitingini í hendi í seinasta lagi 15. juni 1988.

Landsskúlafyrisitingin

Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark

Ráðgevingin veitir hjálp og vegleiðing í sosialum, persónligum og útbúgvingarligum spurningum.

Opið er mánadag, týsdag og hósdag kl. 11.30—15.30, mikudag kl. 16.00—18.00 og fríggjadag kl. 11.30—14.00 (danska tíð).

Adr.: Føroyahúsið, Vesterbrogade 18, mezz., DK-1620 København V.
Tlf. 01-239980.

Ráðgevari

Í samband við nýggju sjóvinnulógirnar, ið løgtingið hevur samtykt, koma í gildi, verður søkt eftir einum fólki, ið fær til uppgávu at umsita lógirnar, herundir at fyrireika tær kunngerðir og reglugerðir, sum skulu gerast í samband við nýggju lógirnar.

Tann, ið settur verður, fær heitið ráðgevari og verður arbeiðsstaðið fyribils á Landsskrivstovuni, men er ætlanin seinni at leggja umsitingina á annan almennan stovn.

Tann, ið settur verður í starvið, skal hava relevanta útbúgving t.d. embætisprógv, men verður dentur lagdur á, at viðkomandi hevur kunnleika til økið.


Løn eftir sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Landsskrivstovuna, Súsonnu Danielsen.

Umsóknir við upplýsing um útbúgving og starvsroyndir skulu vera landsstýrinum í hendi í seinasta lagi 6. juni 1988.

Landsskrivstovan, 17. mai 1988

sosialurin



Nordiska folkhögskolan i Kungälv

Nordiska folkhögskolan söker en lärare i journalistik.

Du bör vara skrivande journalist med undervisningserfarenhet.

Ett brinnande intresse för folkbildning och människor är en förutsättning.

Goda kunskaper i nordiska språk och bred orientering om nordiska kultur- och samhällsfrågor är en merit.

Upplysningar lämnas av Birgitta Nesterud, Nordiska folkhögskolan tel.: 0303-109 45 och av SFHL:s ordf. Rolf Ruthström.

Ansökan sänds till Styrelsen för Nordiska folkhögskolan, Box 1001, 442 25 Kungälv senast den 30/5 1988.

BETAMAX

videotól til sølu.

Tlf. 73443 í Vági

sosialurin

TÓRSHAVN

Skeið í dreyging

Treytað av nóg stórari undirtøku, verður hildið eitt skeið í **DREYGING.**

í viku 23-24-25/88 (06.06—24.06.1988)

Skeiðið er samansett av ástøðisligari og verkligari frálæru.

Byrjað verður á grundstøði. Við lokið skeið svarandi til tað, ið Metalindustriens Efteruddannelsesudvalg heldur á 2. stigi.

Frálært verður í 15 dagar (120 tímar)
Luttakaratal: Hægst 8.
Luttakaragjald: kr. 1.200,-.
Tilmeldingarfreist: **áðrenn 31. mai 1988.**

Fráboðan um luttøku og nærri frágreiðing (eisini um innivist hjá uttanbiggja fólki) v.m. fæst við at venda sær til skúlan á

telefon 11957 mánadag—fríggjadag klokkan 8—12 og 14—16

Tekniski Skúlin í Tórshavn
Tórsgøta 21 - Postbox 239
FR-110 Tórshavn

sosialurin

TÓRSHAVN

Handverkara-eftirútbúgving í HF-TEKNIKK 2

Um nóg nógv tekna seg verður hildið eitt skeið í **HF-TEKNIKKI 2**

í viku 24/88 (13.06—17.06.1988)

Skeiðið er tað seinna av tveimum skeiðum, ið kunnu roknast sum fyrireiking til eitt skeið í Mobil-telefon, NMT-system.

Frálært verður í 5 dagar (40 timar).
Luttakaratal: Hægst 12.
Luttakaragjald: kr. 600,-.
Tilmeldingarfreist: **áðrenn 03. juni 1988.**

Fráboða um luttøku og nærri frágreiðing (eisini um innivist hjá uttanbiggja fólki) v.m. fæst við at venda sær ti skúlan á

telefon 11957 mánadag—fríggjadag klokkan 8—12 og 14—16.

Tekniski Skúlin í Tórshavn
Tórsgøta 21 - Postbox 239
FR-110 Tórshavn

sosialurin